




Puntur nr. 22



# Í fótasporunum hjá Pipar&Salt

*Ein kann rættuliga njóta lívið í Bláu Lón. Er sólin frammi ber eisini væl til at sóla sær, hóast at luftin bara er eini 10 stig*

**Í berari svimjidrakt fari eg út í tí íslendsku mai-luftina. Ísakalt um føtur og kropp, og tað er við iva eg dryppi fótin í tað angandi bláa vatnið. Eg eri í Bláu Lón í Íslandi, og aftan á eina kalda byrjan er njótilsið totalt í tí 38 stig heita vatninum**

BLÁA LÓN
*Orð & mynd: Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Lívbjargarnir ganga runt í tjúkkum gulum jakkum, húgvum og handskum. Á lavasteinunum rundanum lónina liggja baðigestirnir og sóla sær í vársólini. Tað er leygardagur, og Bláa Lón er full av fólki, ið njóta vatn og umhvørvi.

Vatnið er óveruliga ljósablátt, sær næstan út sum onkur hevur blandað mjólk í. At vita, at vatnið eisini er heilsugevandi, ger ikki njótilsið minni.

Botnurin er ikki sléttur, sum í einum vanligum svimjihyli. Hann er knortlutur og nærmast strondini eru lavasteinarnir hvítir av vatninum.

Hitin í lónini kemur úr jørðini tveir kilometur niðri. Vatnið er fyri ein stóran part havvatn, men inniheldur nógv mineral og er sera gott fyri tey, ið hava ymiskar húðsjúkur, sum til dømis psoriasis. Eitt hotell er serliga gjørt til sjúklingar, ið verða sendir til lónina at fáa heilsubót fyri sína sjúku.

Men vit eru bara har fyri at njóta størsta ferðamannastað í Íslandi. 1993 vóru tað 115.000 fólk, sum vitjaðu lónina, og í 2005 vóru tað heili 350.000. Flest fólk eru um summarið, men lónin er opin alt árið og hevur eisini gestir tá tað eru kuldagradir í luftini.

Løgið nokk so er ein ikki kaldur um høvdið, hóast at tað bara er eini 10 stig, tá vit eru har. Kroppurin er so heitur av vatninum, at høvdið næstan verður sum ein skorsteinur. Vatnið heldur ikki sama temperatur allastaðni. Undir træbrúgvunum, sum eru ímillum lavasteinarnar er heitari, eftirsum vindurin ikki er sloppin til at køla vatnið niður.

Ymiska staðni í lónini ber til at fáa hvíta leirmasku at smyrja upp á seg. Hetta verður tikið beinleiðis frá botninum á lónini. Á einum skelti stendur, at maskan skal verða á i 5-10 minuttir, og at húðin gerst bleyt og rein aftaná.

Nógv smyrja seg inn við maskuni, og sær tað eitt sindur løgið út at bara síggja hvít andlit rundan um seg.

## Lat upp í 1975

Lónin lat fyrstu ferð upp í 1975. Tá var tað nærmast bara ein lítil svimjihylur. Í 1999 varð núverandi baðihúsið bygt, og longu nú eru tey í ferð við at byggja meira út. Tað skal verða liðugt næsta ár í 2007.

Tá tú vitjar lónina er eisini gjørligt at fáa massagu í tí heita vatninum, at fara inn í eina bølamyrka steinholu fyri at njóta hitan úr jørðini og vanligt hitarúm við útsýni yvir lónina.

Men tey flestu ganga bara runt og njóta tað himmalska bláa vatnið. Onkur fer upp og keypir sær ein ís, og tað kennist rættuliga sum ein er sunnanfyri, tá ein liggur hálvt undir í heitum vatni við einum ísi í hondini.

Kann lívið gerast so nógv betur?

Eg ivist!




